# Suðuroyar sjúkrahús 70 ár

Hjartaliga tillukku við stóra runda- 70 ára degnum og bestu kvøður um blíðan byr fram á leið. Vit gleðast øll saman við tykkum og standa øksl við øksl saman við tykkum í takksemi fyri tykkara megnar arbeiði.

Rundir dagar skulu hátíðarhaldast. Tað gevur okkum høvi at steðga á og takka teimum, sum hava gingið undan, eins og tað gevur okkum høvi at hugsa hvussu framtíðin kemur

at vera. Tí onki stendur i stað, heldur ikki eitt sjúkrahús. Tørvurin á allatíðina at tillagað seg samfelagstørvin og helst ganga undan við nýggjum og dygdargóðum tilboðum er avgerandi fyri framtíðina hjá sjúkrahúsverkinum og samfelagnum øllum.

Sjúk fólk hava altíð verið hóast sjúkrahús ikki altíð hava verið. Fara vit aftur í tíðina til áðrenn tað Suðuroyar sjúkrahús vit kenna í dag, so stendur í gomlum tilfari at lesa frá 1882. At allir læknar í Føroyum  hava sent løgtinginum skriv um at fáa sjúkrahús á Tvøroyri og í Klaksvík.

John Effersøe, sum var sonur Gudmund Effersøe og beiggi Oliver og Rasmus Effersøe var lækni tá. Hann metti um umsóknina, sum komi 1885.  Metingin hjá honum var, at sjúkrahúsið fór at kosta 6000 kr. og metingin var, at tað var nokk við einum móttøkuhúsið við tveimum stovum til sjúklingar, sum ikki toldu at vera sendir til Havnar. Tað var nokk ikki neyðugt við løntum starvsfólkum. John Effersøe helt fast í at tað skuldi vera eitt sjúkrahús í Føroyum, og at tað var ov dýrt at byggja úti kring landið, men at hann til kundi ganga við til eitt móttøkuhús og ikki meira enn tað. Men onkrastaðni skal man byrja, og tey fyrstu fetini, hvussu smá tey enn eru, eru tey týdningarmestu.

1880-ini hava verið nýbrot í føroyskari sjúkrasøgu tí í 1883 fingu vit eisini Føroya fyrsta Apotek, hóast røddir vóru frammi um, at tað nokk ikki loysti seg at hava Apotek í óbygdum.

Í so máta kenna vit okkurt aftur í kjakinum í dag. Men kanska skulu vit ikki taka tað so tungt, tí tað hevur altíð verið so . Býrt tú fjarskotið so skalt tú altíð kempa dupult bara fyri at fáa tað sum onnur longu hava.

Ting taka tíð. Í 1904, gott 20 ár aftaná umsóknina, kom tað, sum vit kenna sum Tværø Sygehus, og í 153 kom tað

sjúkrahúsið, sum vit nú kenna- og í kvøld hátíðarhalda- Suðuroyar sjúkrahús.

So man skal, enn sum tá, arbeiða langsikta og hava tol tá ið tað kemur til ætlanir á heilsuøkinum.

Týdningurin av sjúkrahúsinum kann neyvan metast í orðum og flest eru vit samd um, at týdningurin er so mikið avgerandi, at sjúkrahúsið er ein grundleggjandi fortreyt fyri at vit búgva her. Tað gevur tryggleika, tí ongin vil búgva eitt stað har ongin hjálp er at fáa blíva vit sjúk. Tí má sjúkrahúsið hava akuttfunktiónir umframt tað dagliga virksemi sum eitt nú pínuviðgerð, hjarta og skurðtænastur

og viðgerðir, endurvenjing, palliatión, stórt ambulant virksemi og mangt mangt annað.

Í allarringastu tíðum, frá 1990 og til 1995 bleiv sjúkrahúsið um og útbygt til tað, sum vit nú hava. Tað má sigast at vera eitt satt bragd. Í djúpastu krepputíð, við søguligum arbeiðsloysi og søguligari fólkafráflyting megnaði man at byggja út- byggja nýtt. Tað er ótrúligt. Tað sigur nakað um seiggi í okkara fólkum. Tað sigur eisini nakað um at halda fast í vónini og kempa. “ Tann sum bara hyggur eftir vindinum kemur ongantíð at heysta” Og tað sigur ikki minst hvussu stóran týdning eitt sjúkrahúsverkið hevur. Sjálvt tá ið ongir pengar eru so raðfestir man tað. Tað áræði og

dirvi, sum tá var er einastandandi og tøkk fái tit sum slóðaðu fyri. Guð viti hvar vit vóru í dag um tað ikki varð gjørt. Man skal hugsa stórt, eisini í truplum tíðum.

Seinni árini hevur stór menning verið í sjúkrahúsverkinum. Nýggj viðgerðartilboð leggjast alsamt til og innleggingartíðirnar eru styttar nógv. Nýggja speciali eru komin og ferðin í verkinum eins og krøvini frá fólki økjast.

Tað hevur verið nógv tosað um at stytta bíðilistar og at vit skulu hava viðgerðartrygd. Endamalið er gott og ongin kann vera ósamdur í, at bíðitíðirnar skulu vera stuttar. Vandi er tó í hvørjari vælferð. Vit mugu ikki gera sama feil

sum grannalondini har almennu sjúkrahúsini hava goldið kostnaðin av hesum tí man í strembanini eftir stuttum bíðitíðum hevur flutt fleiri viðgerðir til privathospitalini. Almennu sjúkrahúsini gjalda og menningin har steðgar. Tað kjakið eiga vit at taka, og vit skulu taka tað við støði í hvat tænir sjúklingunum og samfelagnum best.

Tað sæst í miðlunum í okkara grannalondum, at stórt fokus er á heilsuverkini. Viðgerðarparturin fyllir nógv, og tað skal tað. Dygd og menning av viðgerðartilboðum er alneyðug. Meira gransking kann bøta um sjúklingatrygdina og støðug menning av starvsfólkahópinum er ein treyt skulu vit veita bestu tænastu.

Men vit mugu ikki í stóru krøvunum, strongdini og høgu ferðini gloyma umsorganina og tað menniskjaliga. Tað er í veruleikanum ein minst líka stórur etiskur spurningur, sum tá ið vit tosa um hvussu nógv vit skulu viðgera. Tað millummenniskjaliga og relatiónir og tann umsorganin sum menniskja tørvar hevur kanska ongantíð verið størri. At vit kenna okkum í góðum hondum, trygg og møtt við umsorgan hevur eksistensiellan týdning. Tí tá ið tú eru sjúkur rørir tað við lívsins stóru spurningar- lív og deyða. Týdningurin av umsorganini kann tí ikki metast nóg høgt og vit eiga at lyfta tann partin sum nakað neyðugt í allari viðgerð. Góð og nøktandi umsorgan við høgum fakligum

viðgerðarligum dygdum annars er besta samanrenningin. Høvrgin skal standa eina.

Sjúkrahúsini er starvsfólki. Øll eru líka týdningarmikil líka mikið hvør uppgávan er. Er tað røkt, viðgerð, reingerð, matur, kanningar, blóðroyndir, skrivstova, skrivarar, gongsgentur, portørar, maskinmenn, pedellar, ella hvat tað kann vera. Øll hava sín týdningarmikla leiklut í at útføra tað tænastu, sum sjúkrahúsið veitir. Nógv sóu tykkara týdning í koronatíðini, men tykkar týdningur er størri enn tað. Hann er har hvønn dag, árið runt og hvønn klokkutíma.

So hjartaliga tillukku

# Gáva frá Almannaverkinum